# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Fimleikalið í 1925



*Mynd frá »realskúlaframsýningini 1916-66« sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í summar. Her er ein mynd av einum fimleikaliði í 1925.*

***Aftasta rað f.v.:*** *Petur Dahl, Debes Christiansen, Ove Thomsen, Freddy Juhl Petersen » Wienerbarn« (vaks upp í Frelsunarherinum), Jákup Johansen og Olaf Magnussen úr Saksun*

***Miðraðið f.v.:*** *Karin Jacobsen, Anna Christiansen (Joens2en) av Stykkinum, Helma Rubeksen (Michelsen), dóttir Stóra Óla, Oddvør Evensen, dóttir Próst Evensen, Helena Mørk (Hjelm), Ebba (Ki) Jacobsen, Tønny Egholm (gift í DK)*

***Fremsta rað f.v.:*** *ókend, Helena Bærentsen (seinni lærarinna), Armgarð Andreasen (Systi), gift Hull, Gunhildur Isholm, dóttir Kristin í Geil, Jensia (Duddan) Andreassen, (Dahl), Amanda Danielsen úr Mykinesi (Akraberg Hansen)*

*Um onkur hevur okkurt at viðmerkja til hesa myndina, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánialsdóttir á telefon: 226024.*

*Myndaeigari: Fornminnissavnið*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Regin Skaalum** í Vági andaðist á Suðuroyar sjúkrahúsi, 70 ára gamal.

**Ketty Marie Hamrá** í Hósvik andaðist týsdagin á Landssjúkrahúsinum 84 ára gomul. Kistan fer úr kapellinum fríggjadagin klokkan 15 til Hósvíkar. Jarðarferðin verður leygardagin klokkan 13 úr Hósvíkar kirkju. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Ketty kunnu lata Reyða krossi eina gávu, konta í peningastovni.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið á ymiskan hátt gleddu okkum á gullbrúdleypsdegi okkara tann 15.des. 2007.
Ein serlig tøkk til Manskórið í Thabor fyri vakran sang.

**Marjun og Tórur Olsen, Fuglafirði**

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu, tá ið okkara kæra

**Elsebeth Katrina Jacobsen (Ebbedinna)**
í Kollafirði

doyði og varð jarðað.
Ein serstøk tøkk til Eldrasambýlið fyri alt, tit gjørdu fyri hana, meðan hon var har. Tøkk, øll tit, ið vitjaðu hana og vóru um hana líka til tað síðsta. Eisini ein sertøk tøkk fyri gávurnar, ið givnar vórðu til Zion (fyri Bíbliur til Eysturevropa). Síðst, men ikki minst, tøkk fyri lánið av Bygdarhúsinum, og tøkk, allar tit, ið tóku tykkum av ervinum.
Tøkk til berarar, talarar og øll tykkum mongu, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað her á fold.

*Familjunnar vegna*
**Martha og Hjørdis**

Lesið Sosialin - so eru tit við

**2. februar. Kyndilsmessa**. Er upprunaliga ein mariumessa og varð hildin til minnis um vitjan Mariu í halgidóminum 40 dagar eftir føðingina, sum siður var hjá jødiskum konum. Henni til minnis og barninum til heiðurs vórðu kertur og kyndlar tendraði, og av tí kemur navnið missa candelarum. Navnið candela merkir vaksljós. Victor Danielsen doyði hendan dagin í 1961.

**3. februar, Blásius,** deyður umleið ár 300. Tikin av døgum fyri trúar sakir. Var biskupur í Sebaste í núverandi Turkalandi, og av tí at hann bjargaði einum smádrongi, sum hevði sett eitt fiskabein í hálsin, varð hann tilbiðin sum verndari fyri hálsverk. Dagurin var eisini róptur blámessa, og var blámessudagur stillur og klárur, boðaði tað fyri einum brúsandi vári, varð sagt.

**4. februar. Veronica**. Vit vita einki um hesa halgikvinnu uttan tað, sum halgisøgan sigur, at hon var ein, ið fylgdist við Jesusi, og at hon á leiðini út til Golgata turkaði sveittan av andliti hansara. Tá ið hon fekk turrklæði aftur, stóð mynd frelsarans á tí, og tað varð síðani varðveitt sum ein dýrur gripur. Hann varð róptur vera ikon, sum merkir tann sanna myndin. Harav kemur eisini navnið á halgikvinnuni.